# Dreymapoppur

**Tónleikurin var framúr, tá ið Lena Anderssen hevði konsertir um vikuskiftið. Góðir tónleikarar, góðir sangir og ein væl upplagdur sangari bóru framførsluna allan vegin**


*Ein fantastisk konsert við fantastiskum tónleikarum*

TÓNLEIKUR

*Jan Müller*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

"Eg fekk bara tíð at mála mær neglirnar á fótunum. Tit kunnu koma og hyggja eftir teimum aftan á, tær eru ordiliga flottar".

Soleiðis segði Lena Anderssen skemtandi, tá ið hon á pallinum í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið greiddi frá stóra stríðnum seinastu vikurnar. Tey hava gjørt fløguna lidna, og síðani fóru tey beinleiðis í venjingarhølini, har framførslan um vikuskiftið skuldi venjast væl og virðiliga.

Hetta hevði gjørt, at hon hevði havt lítlar stundir at hugsa um alt annað í sambandi við konsertina - klæði og annað. Og so helt hon fyri, at hon bara kláraði at smyrja sær neglirnar á tærnum áðrenn fyrstu konsertina.

Men hetta var nú ikki avgerandi fyri konsertina. Tónleikurin var í miðdeplinum, og tað var framúr gott.

### Super

Bólkurin, sum spældi undir hjá Lenu, var mannaður við góðum og royndum tónleikarum, og teir syrgdu eisini fyri, at grundarlagið hjá Lenu at syngja á var trygt og framúr gott.

Niclas Johannesen, Óli Poulsen, Finnur Hansen, Ólavur Øster, Jákup Zachariassen og hini sungu og spældu ótrúliga væl, og tá ið høvuðspersónurin sjálvur eisini var á toppinum hetta kvøldið, kundi tað bara enda við eini super konsert.

Lena sang framúrskarandi væl, og ongantíð hevði nakar varugan av, at hon spardi seg í nøkrum sangi.


*Lena kundi einsvæl staðið á altjóða palli, so væl kom hon frá uppgávuni*

Alt var gjørt við lív og sál, og tað merktist.

### Frálíkur poppur

Sangirnir, sum vóru á skránni, vóru teir, sum eru við á nýggju fløguni hjá Lenu Anderssen ? Can´t Erase It - og teir vóru fínir. Lena hevur skrivað teir saman við manni sínum Niclas Johannesen, og so hevur produsarin Óli Poulsen eisini havt ein avgerandi fingur við í spælinum.

Sanginir eru ymiskir og spennandi. Summir fanga beinanvegin oyruni, meðan aðrir helst hava brúk fyri eitt sindur av tíð. Men í øllum førum er talan um nakað av tí besta popptónleikinum, sum er skrivaður í Føroyum í langa tíð.

Fólk vildu heldur ikki sleppa Lenu, tá ið konsertin var av, og hon noyddist sjálvsagt spæla eitt eykalag fyri fólkinum.

Nú verður spennandi at vita, hvat ferðin til Kanada kann hava við sær hjá teimum báðum, Lenu og Niclasi.


*Óli og Jákup í essinum*


*Fegnir tónleikarar eftir sera hepnu framførsluna í Norðurlandahúsinum*

